*Framhald av síðu 9*

demokratiska landið í heiminum, tí allir borgarar fáa loyvi at atkvøða um nærum alt, hvørja ferð okkurt mál er frammi.

Ladonia nýtist onki hervald, tí øll kríggj kunnu avgerast á alnótini. Fá lond hava so nógvar ambassadur sum Ladonia, ið hevur sendiharrar um allan heimin.

### Eitt alnótaranarki

Tað er ikki so dýrt at vera borgari í Ladonia. Skattur finst fyri so vítt ikki, men tað kostar skapanarevni, ið ein má gjalda við. Annars eita pengarnir í landinum Ortug, ið svara til einar 8 krónur. Landið hevur egin frímerki og postnummur. Tá so brævið er stemplað vil tann, sum sendir tað bera tað út sjálvur. Postnumrini eru t.d. støð sum 135 steinurin við ánna, 432 hegnpelin í miðjuni o.s.fv.

Sjálvt um alt hetta kann tykjast tápuligt, og hesi fólk sum ørvitis-knokkar, so er ikki sørt, at ein øtast, tá ein lesur um ráðharrarnar í Ladonia, tí ikki er eiti á. Fleiri eru t.d. kendir granskarar, filmsleikstjórar, heilakirurgar úr øllum heiminum, ið hava tað til felags, at hesi fólk vilja gera vart við, at tey halda tað vera nærum meiri meiningsfult at vera lodonianari enn t.d. at vera svenskari, dani, ungari o.s.frv. Hetta er eitt slag av boheme og droymara internationale, ið prutlar av hugskotum, skapanarlyndi og hugi.

Formliga er Ladonia ein republikk og eitt kongaríki, ið tí bæði hava ein president, ið eitur Fernando Rodrigues og eina kongafamilju, har drotningin eitur Ywonne I Jarl. Ynskir ein at gerast lordur, barónur, baronessa, greivi, greivinna o.s.fv. kann ein gerast hetta fyri einans 12 dollarar. Annars eru øll ikki eins í landinum Ladonia, sum í øllum øðrum londum. Tað eru fýra stættir: vanlig fólk, heiðursborgarar, andaligir persónar og aðalsfólk. Men óformliga er Ladonia meiri eitt slag av anarki, sum hevur onkrar tankar til felags við t.d. stevnum og festivalum so sum Burning Man og Woodstock í USA, Roskilde Festivalin í Danmark og Christiania í Keypmannahavn. Hetta um vit seta eitt vet av cyberspace og Monthy Python skemti til.

### Gransking og endamál við Ladonia

Í Ladonia er eitt av endamálunum at gerast hin mest vísundaligi staturin í heiminum. Ein megnar granskingarverkætlan er um sirkulin, ið granskarar ið granska byrjanir og endar hava serliga torført við at skilja. Tjóðarbókasavnið í Ladonia hevur soleiðis arbeitt í eitt áramál við at savna saman rundar lutir, so sum dekk, diskar o.s.fv., samstundis sum áhugin í metaforiskum sirkulum er alsamt vaksandi. Serliga er ambitiónin at granska artiska sirkulin, ið teir tíverri ikki kunnu húsa í Ladonia, men ein verkætlan er í løtuni í gongd at fáa 30 cm. av artiska sirkulinum fra økjum sum Chegytun, Mukhomornoye, Arga, Khonu, Unkyur, Kotekh, Ust-Kureyka, Nyda, Abez, Nes og Kuzreka í Sibiriu. Rovianemi í Finlandi, Jokkmokk í Svøríki, Mo i Rana í Noreg, Raudarhofn Íslandi, Angmagssalik í Grønlandi, Echo Bay í Kanada og Selawik í Alaska.

Ein megnar granskingarætlan, ið er sett í verk, er arbeiði við at skapa ein nýggjan kalendara og eina nýggja tíðarfatan, ið er ikki-linjurøtt, kaotisk og synkron. Somuleiðis skulu allir dagar hava nøvn, samstundis sum hugtøkini um dagar og ár skulu fyribeinast.




Annars er ein ætlan at byrja at hópframleiða alnótarbygningar, útflyta súreplir, steinar og sjógv.

### Tjóðarbygging og nationalstaturin í dag

Tað, sum er so hugvekjandi við Ladonia, er, at alt hugskotið hjá listarmanninum Lars Vilks fær okkum at hugsa um hugtøk sum tjóð, tjóðarbygging og hvat eitt samfelag má hava fyri at vera eitt "veruligt" land. Hetta er fyrst og fremst stuttligt, ironiskt og kanska provokerandi, tí hesir menn hava bygt hetta land á hugmyndafrøðina, ið er vanlig, tá eitt fólk setti sær fyri at byggja tjóð, og á henda hátt kenna vit til alt hetta sum føroyingar. At lesa og liva við Ladonia sum tjóð, er sum at ímynda sær, at Monthy Pythons Flying Circus høvdu stovnað og bygt eitt land, tí tað mesta í hesum projektinum er absurd og stuttligt, og skemtingarsemi er m.a. tað, sum allir tjóðsangir og tjóðskaparrørslur púra vanta. Tað, sum er mest hugvekjandi er, at hesir tjóðarbyggjarar vanta alt hatta patetiska og kensluborna grundarlagið, ið nærum altíð vil fylgja tjóðarbygnaðarprojektinum og tí nationalismu, ið kanska nærum blindar mangan úrmæling, eisini í Føroyum. Hesi fólk hava brúkt hesa orku uppá at skapa utopiir, visiónir um tað besta landið í heiminum, ið eisini er ein tjóðarbygging, ið byggir uppá eina markleysa virðing fyri skapanarlyndi, hugflogi og frælsi hjá tí einstaka. Politikur er jú ikki annað enn, hvat vit gera hann til, og hví kunnu vit ikki hava ein jazzráðharra ella eitt kærleikamálastýri? Tað er bert ein spurningur um at nóg nógv eru samd um hetta, so er hetta ein veruleiki. Soleiðis kann hetta projekt fáa fólk at hugsa veruliga djúpar tankar, og kanska royna at hugsa nógv longur enn gomlu hugmyndafrøðirnar loyva, tí eisini tær hava verið púra garvillir einaferð tá tær komu fram, hetta mangan fyri eini 100 til 200 árum síðani. Soleiðis kann hetta "land" seta spurnartekin við onnur lond, og sjálvt hugtakið um nationalstatin í dag, ið fær alt minni týdning, samstundis sum einstaklingagerðingin og altjóðagerðingin leggja eitt fantastiska vakurt brá á tilveru okkara her í 21 øld. og litar heimin í øllum litum, og á henda hátt gera tað fantastiska spennandi at liva í dag. Í mun til modna og innilokaða roykin í nationalstatinum, er Ladonia kanska tað stuttligasta landið í heimssøguni, eitt land ið fær ein at ynskja gamla nationalstatin av veikanum og til. Kanska eg skuldi farið í útlegd í Ladonia.

Sí annars lovaða landið: www.ladonia.net

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Árni Gregersen, Bornholm, argr@tv2bornholm.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Útlegd

At liva í útlegd hevur við sær, at ein ikki kann taka lut í tí, sum hendir heima í Føroyum. Útlegdin kann vera sjálvvald - ella hon kann hava aðrar orsøkir.

Hjá okkum føroyingum, sum eru í útlegd, er hendan oftast sjálvvald. Verri er hjá fólki, sum orsakað av kríggi ella øðrum noyðast at velja útlegd fyri ikki at missa lív. Teirra støða er ein heilt onnur - tey hava ikki sama valmøguleika sum vit onnur.

At liva í útlegd hevur sjálvandi fyrimunir og vansar. Størstu vansarnir eru sjálvandi, at vit ikki kunnu taka lut í tí, sum upptekur føroyingar, sum búleikast í Føroyum.

Stórhendingunum kunnu vit fylgja við í. Samskiftið er so gott í dag, at vit fáa eins skjótt tíðindi í Australia, sum tey í Skúgvi. Alnótin ger, at vit lesa Sosialin líka skjótt, og vit hoyra Útvarpið. So á tann hátt eru vit ikki afturút.

Nei, verri er tá ið ein er í útlegd tær smærru hendingarnar. Føðingardagar, brúdleyp, merkisdagar og ikki at gloyma jarðarferðirnar.

Nógvir sjómenn vita eisini, at eitt tað torførasta at halda skil á, tá ið ein er leingi burtur eru andlátini. Serliga um eldri fólk fara, sum tú ikki beinleiðis hevur við at gera - og heldur ikki heima hevur hitt dagliga.

Tey fólk, sum tú í smásamfelagnum kennir sum eina tonn í samfelagshjólinum. Fara tey higani, so mangla tey, men vit sum burtur eru, merkja tað ikki altíð beinanvegin. Heldur ikki fáa vit tað altíð at vita beinanvegin, tí fyri teimum, sum heima búgva, kann hetta vera vanlig gongd. Fólk kunnu hava verið seingjaliggjandi við sjúku leingi, og so kann hetta vera nátturligur endi á einum longum lívi.

Eitt annað, sum torført er at halda skil á, eru børn, sum vaksa og gerast tannáringar - ella vaksin. Er tú burtur av landi, so er ilt í hugburði at fylgja við, hvussu tey vaksa og mennast.

Men her kemur ein av fyrimununum at koma úr smásamfelagið okkum til góðar. Vit kenna mong av foreldrunum, og kunnu brúka ymiskar metodur til at plasera fólk. Vit vita hvørja ætt tey hoyra til, og vit kunnu gita okkum fram til, hvørs sonur ella dóttur viðkomandi er. Vit, sum eru komin eitt sindur upp í árini, duga eisini at síggja hvørjum tey líkjast.

Alt hetta kann kanska ikki í gerandisdegnum hava so stóran týdning, men hvørja ferð, tú kemur heim at vitja, hevur hetta týdning. Tú kanst á tann hátt taka nógv skjótari lut í gerandislívinum.

Í 14 dagar hevur systursonurin verið í starvsvenjing her á Bornholm. Vit hava sjálvandi havt samband í árunum síðan vit fluttu higar, men sjey ár er long tíð ikki at hava dagligt samband. Unglingar mennast eisini frá tí teir eru níggju ára gamlir, og til teir eru brummandi menn, 16 ára gamlir. Stuttligt at síggja hesa menning og ta tíð, tað tekur at gera dreingir til menn.

Allur hesin orðavavstur komst sjálvandi av stórhendingini í Føroyum hesa vikuna. Val til løgtingið er altíð spennandi, og sum nevnt omanfyri, ber nú væl til at fylgja við, sjálvt um tú ert uttanlands.

Og valið hesuferð hevði stóran áhuga í donsku fjølmiðlunum. Sjónvarp, útvarp og bløð her hava øll havt fólk í Føroyum, og eg noyðist at siga, at hesaferð hava tíðindafólkini verið betur fyrireikað. Tað hevur mangan fingið meg at ilskast, tá ið eg havi hoyrt ella lisið "klókar" frásøgnir úr Føroyum við faktuellum feilum. Anfinn Kallsberg, formaður í løgtinginum, Jóannes Ejdesgaard, formaður í sambandsflokkinum, og so framvegis. Tað ber illa til at trúgva restini, tá ið tíðindafólk taka so illa feil.

Og at enda: várið er komið - mei og gott veður.

Jú - hóast alt: ljós er fyri framman.

Gott vár.



**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fulltrúi í Mentamálastýrinum

**Starvið:**
Í Fólkaskúladeildini er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja.

Mentamálastýrið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild.

Í Fólkaskúladeildini starvast tveir undirvísingarleiðarar, og tann, sum settur verður, kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við hesar báðar og við stápsfunktiónirnar í stýrinum.

**Vit søkja eftir einum fulltrúa, sum:**
- hevur hug at arbeiða í einum toymi í Fólkaskúladeildini
- hevur áhuga fyri og kunnleika til skúlaøkið
- hevur áhuga í at arbeiða við tølum, greiningum, hagtølum v.m.
- hevur innlit í vanlig telduforrit, dugir at arbeiða við rokniarkum, databasum o.s.fr.

**Høvuðsuppgávurnar verða at:**
- gera fyrisitingarligar leiðreglur
- gera búskaparligar myndlar
- umsita sáttmálaviðurskifti
- útvega hagtøl

**Harumframt skal viðkomandi eisini taka sær av at fyrisita:**
- Læraraeftirlønir
- Húsarhaldsskúlan
- Føroya Fólkaháskúla
- Privatskúlar
- Eftirskúlar
- Fríksúlar

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla, útbúgving á líknandi stigi ella læraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

Umsøkjarar við fyrisitingarligum royndum hava fyrimun.

**Vit bjóða:**
- eitt sjálvstøðugt starv í einum mennandi umhvørvi
- eitt gott umhvørvi
- eina deild við virknum starvsfólki.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvsuppgávunum.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fatar um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. mai 2002. Starvið verður sett frá 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra í Fólkaskúladeildini, tlf. 35 50 50.

***Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Øki hjá Vinnu- og Miðnámsskúladeildini*** *umfatar studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlan, sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlan og lærlingaútbúgvingar.*

**Brúktur Seat Arosa Diesel**




Seat Arosa Diesel
Árg. 11/99 km. 64.000 litur: metal gráur
útgjald 21.000,- / 105.000,-
Bilurin er í sera góðum standi, sum nýggjur.
**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

GLA' VOX **Barnakonsertir**



Gla'Vox er eitt norskt barnakór við 45 børnum í aldrunum 9-13 ár

**Í Ítróttarhøllini á Giljanesi**
Hósdagin 9. mai kl. 15.00
Saman við Gla'Vox luttaka 120 børn úr Vágum

**Í Ítróttarhøllini í Runavík**
Leygardagin 11. mai kl. 16.00
Saman við Gla'Vox luttaka 320 føroysk børn

**Í Ítróttarhøllini í Havn**
Sunnudagin 12. mai kl. 16.00

**Atgongumerki til konsertirnar á Giljanesi & í Runavík á kr. 50,- fáast á hesum støðum:**
Shellstøðin við Ringvegin & í Gøtudali, Kiosk Vár í Saltangará, Myllan í Miðvági, Valdemar S. í Sørvági & Hjá Ásu í Sandavági, Statoilstøðini á Strondum & í Klaksvík

**DYNAPAC**
*-maskinurnar sum halda!*



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein** Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**